## Brúka tónleik sum heilivág

Á fleiri donskum sjúkrahúsum eru tey farin at brúka tónleik sum eitt slag heilivági, skrivar Fyens Stiftstidende. Eitt nú fáa sjúklingar á Odense Universitetshospital sissandi tónleik í oyruni, tá tey rakna við aftur eftir skurðviðgerð. Lars Holst, sum stendur fyri royndunum við tónleiki sum heilivági, sigur við blaðið, at tónleikurin ávirkar ikki bara okkara kenslur, men eisini annað so sum hjartað. Royndir aðrastaðni hava eisini víst, at tónleikur kann linna pínu.



## Roykja ikki inni

Annaðhvørt heim í Danmark hevur roykibann. Ein nýggj kanning hjá Epinion vísir, at í dag er royking bannað í 47 prosentum av teimum donsku heimunum. Í 2004 var talið 21 prosent. Inger Haunstrup Clemmensen, yvirlækni hjá Kræftens Bekæmpelse, sigur við DR, at í dag halda fólk tað vera eitt rímiligt krav, at tey fáa reina luft niður í seg. Eisini heima við hús, og tað vísir, at hugburðurin hjá dønum er nógv broyttur tey seinastu árini, sigur hon.

*Í Danmark hevur annaðhvørt heim roykibann*

*Mynd: DR*

# Rúsdrekkakoyring og bardagar

**Meðan fólk skikkaðu sær væl á G Mini, mátti politiið rykkja út til bæði bardagar og rúsdrekkakoyring aðrastaðni í landinum**

POLITITÍÐINDI
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ein fullur bilførari endaði lúkst í føvninginum á politinum, tá hann kom skinklandi í bili móti einum politibili á Kollfjarðarvegnum í leygarkvøldið.

### Ávirkaðir bilførarar

Politiið í Havn fekk skjótt illgruna um, at okkurt ikki ruggaði rætt, tá ein bilur á Kollfjarðarvegnum í leygarkvøldið kom skinklandi móti teimum og hevði meir enn ilt við at halda seg á sjálvum vegnum. Onkra løtuna endaði bilurin uppi á gongubreytini, áðrenn hann skinklaði víðari út á vegin.

Bilurin bleiv alt fyri eitt steðgaður, og kanningin á staðnum víst skjótt, at bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Um fýra tíðina í sunnumorgunin fekk politiið boð um, at ein bilur lá og koyrdi heldur undarliga og ótrygt uppi við Hjalla í Havn. Politiið fór á staðið, og eisini her vísti ov nógv rúsdrekka seg at vera upp í koyringini.

### Ferðsluóhapp í Gøtu

Hóast tað sum heild var rættiliga friðarligt á G Mini, mátti politiið upp í leikin leygarkvøldið. Tvær ungar gentur høvdu tá fingið so nógv niðurum, at tær máttu koyrast á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum til útpumpingar.

Eisini fríggjadagin varð politiið boðsent til Gøtu, tí ein bilur var farin oman av vegnum omanfyri Syðrugøtu.

Óhappið hendi, tá ein bilur snaraði út fyri ein annan, ið var á veg norðureftir landsvegnum omanfyri Syðrugøtu. Í eini roynd at bremsa og snara undan, fór bilurin, ið var á veg norðureftir, oman av vegnum og bóltaði runt nakrar ferðir oman gjøgnum bøin. Ongin persónsskaði stóðst av óhappinum.

### Leysir nevar

Okkurt bendir annars á, at nevarnir sótu heldur leyst í Suðuroy um vikuskifti. Tvær ferðir mátti politiið nevniliga upp í leikin á einum skeinkistaði á Tvøroyri. Í báðum førum var talan um, at ungir menn fóru farnir til hendurs, og onkur varð sligin við knýttum neva beint í andlitið. Ongin álvarsligur skaði stóðst tó av tilburðunum.

# Borgarar fangaðir í stríði um vegbungur

**Nakrar vegbungur eru orsøkin til, at borgarar í Vestmanna kunnu gerast noyddir at velja millum ferðslutrygd og nøktandi tænastu frá Bygdaleiðum**

FERÐSLA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Seinasta mikudag steðgaði Strandferðslan koyringini hjá leið 100 út í bygdina í Vestmanna. Orsøkin er, at bussførararnir á leiðini siga seg hava ov stóran ampa av vegbungunum, sum Vestmanna Kommuna lat gera fyri stuttum.



*Vegbungurnar, sum skuldu økja ferðslutrygdina eru nú eisini orsøk til, at borgarar í Vestmanna nú fáa verri tænastu frá Bygdaleiðum hjá Strandferðsluni*

### Revsað fyri ferðslutrygd

Borgarstjórin í Vestmanna, Karl Olsen, harmast um útspælið frá Strandferðsluni, sum han hevur ilt við at skilja.

- Vit hava gjørt hesar vegbungurnar eftir nógvum áheitanum frá borgarарum í kommununi og fyri at økja um ferslutrygdina. Afturfyri verða vit revsað, við at tænastustøðið hjá Bygdaleiðum her í bygdini lækkar, sigur borgarstjórin.

Hann leggur afturat, at vegbungurnar eru gjørdar eftir teimum fyriskriftum, sum eru galdandi fyri slíkar vegaforðingar, og tí skilur hann ikki rættiliga, hvat tað er, kommunan skal hava gjørt skeivt.

Men bussførararnir á leiðini hava eftir øllum at døma kortini ampa av bungunum, og á Strandferðsluni vísir samferðsluleiðarin, Bogi Mortensen, á, at stovnurin hevur skyldu at tryggja sínum bussførarum góðar arbeiðsumstøður.




*Í síðstu viku boðaði Strandferðslan sínum viðskiftafólkum í Vestmanna frá, at leið 100 ikki longur koyri út í bygdina*

Spurdur, um Strandferðslan ikki eisini kennir sær eina skyldu mótvegis sínum viðskiftafólkum, sigur Bogi Mortensen, at tað ger stovnurin sjálvandi.

- Men beint nú fá eg ikki sagt, hvør skylda vigar tyngst, sigur Bogi Mortensen, sum í dag fer til Vestmanna at kanna málið.

Í løtuni kann samferðsluleiðarin tó ikki lova, at busskoyringin út í bygdina í Vestmanna verður tikin uppaftur.

- Vit fara millum annað at kanna, hvussu nógv fólk yvirhøvur hava brúk fyri, at bussurin koyrir heilt út í bygdina, sigur Bogi Mortensen.

Uttan mun, til hvat hendir í dag, tá Samferðsuleiðarin kemur á vitjan, er borgastjórin í Vestmanna ikki sinnaður at góðtaka, at busskoyringin á strekkinum verður niðurløgd.




